Lýsingartorgið

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
✓ privatar lýsingar
✓ í mesta lagi 40 orð
✓ bert ein lutur í hvørjari lýsing
✓ hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
✓ frá fyritøkum og virkjum
✓ fleiri enn 40 orð
✓ søluvirði oman fyri 20.000 kr.

tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
50,- kr. + MVG hvørja ferð:
✓ lýsingar undir teigunum: »Dansur«, »Fundir« og »Matur«
✓ Bill. merktar

Akfør

15" FELGUR
4. stk. titanium sportfelgur við dekkum str. 195/50-15.
Tlf. 282116

2 FORSETUR
sum nýggj til BMW 525, árg.´89, fyri 900 kr.
Tlf. 210560 ella 423572

4 NÝGGJ PÍKADEKK
á píkadekk 2.800 kr. Passa til Opel Ascona, Honda Civic, Charade.
Tlf. 423572 ella 210560

AMBOÐ TIL SØLU
Dekkmaskina til bilar (hálvautomatisk) til sølu. Ein co2 fløska lítil.
Tlf. 215141

AX SPORT
Svartur Citroen AX Sport árg. 90, 1,3 við 2 dubultum karboratorum. Ein AX GT kann fylgja við sum eykalutir. Prísuppskot: 28.000 kr.
Tlf. 310758, best eftir kl. 19

BILUR YNSKIST TIL KEYPS
fyri max. 10.000 kr.
ring 448923

BMW 325 i
Árg.´88, til sølu er í sera góðum standi, alla útgerð.
Tlf. 210346

DAIHATSU CHARADE
Árg. ´86: Hurð v/a, hurð h/a, h/f og baklúka. Prísur 1.500 kr.
Tlf. 449613
ella 217200

DRAGIHURÐ
til Toyota Hiace, árg.´90, til sølu fyri 550 kr. Útvendig lás o.a.
Tlf. 210560
ella 423572

FORD ESCORT 1,6
Árg.´87. Svartur, el-rútar, sentrallás, best egnaður sum eykalutir.
Tlf. 221012 ella 423044
eftir kl. 15, Helgi

FORD ESCORT 1600
til sølu um hóskandi boð fæst. Elrútar framman, air-condtion, vetrardekk fylgja við. Bilurin er frá 1999 og hevur koyrt 7.000 km.
Tlf. 319528

ISUZU PICK UP
diesel, árg.´88, hevur koyrt uml. 272.000 km. Til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 451026

KAMPINGBUSSUR
Peugot J5. Krevur nógvar ábøtur, ger tín egna buss. Til sølu fyri 4.000.
Tlf. 210560
ella 423572

MAZDA 323
1.6 GTI, vínreyður árg. 89, koyrt 100.000 km. Hevur sportfelgur, nýggj dekk, nýtt útstoyt, nýggjari stoytdoyvarar, 2 hurðar, JVC anlegg, JBL hátalarar, til sølu fyri 24.000 kr.
Tlf. 214666
ella 447466

MAZDA 323
til sølu, árg. 86, krevur ábøtur, koyrt 170.000 km, prísuppskot 20.000 kr.
Tlf. 421330

MAZDA 626
árg. ´87, til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 373347
ella 210347

MERCEDES 250 SE
Árg.´84, 6 cyl, 2,8 í, 190 HK, koyrir sum ein dreymur, nýsýnaður við sportfelgum. Skal síggjast. Bíliga til sølu.
Tlf. 221021

MITSUBISHI
Pajero exe.jeepur, árg. 87, í sera góðum standi, spildurnýggj dekk, hevur eykaútgerð, so sum el-rútar, varma í setrum, powerstýring og centrallás. Má síggjast og roynast. Til sølu fyri uml. 50.000 kr.
Tlf. 448764 ella 447485,
spyr eftir Terja

MITSUBISHI COLT
1,5, 97.000 km. Árg. 88-89. Bilurin sær gott út uttan og innan, verður seldur nýsýnaður. Prísur 18.000 kr.
Tlf. 215141

MITSUBISHI GALANT
1,8 Turbo Diesel, Árg.´87, nýsýnaður ongan kross. Hevur sportfelgur, el-spegl + hevur smávegis brek. Kom og síggj hann og gev eitt boð, annar bilur kann fylgja við sum eykalutir.
Tlf. 448764

MITSUBISHI LANCER
við skaða framman til sølu sum eykalutir, bilurin hevur servostýring, sentrallás og elrútar framman og er sedan, árg.´87.
Tlf. 448923

MITSUBISHI PAJERO
2,3 TD í góðum standi, árg. 10/1988. Til sølu.
Tlf. 212196

NISSAN
King cab, til sølu fyri 1000 kr.
Tlf. 448245

NISSAN SUNNY
B 11, diesel, árg. 1986 til sølu.
Tlf. 441532

NISSAN SUNNY
1,6 SLX Coupe árg. ´88, svartur. Nýsýnaður. Eykaútg: sportfelgur, sóltak, el-spegl, el-rútar, stereo, T-útstoyt, senkaður, í sera góðum standi. Má síggjast.
Tlf. 448764

OPEL ASCONA
Ein Opel Ascona 1.6, árg. 86, til sølu sum eykalutir.
Tlf. 455221

OPEL KADETT
1,6 S stationcar, 5 hurðar, uml. 185.000 km., píkadekk + eykasett av dekkum á felgum. Til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 449613 ella 217200 á kvøldið

PEUGOT 1,9
árg. ´87, til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 282116

PEUGOT 106
árg.´98, til sølu. Koyrt 62.000 km.
Tlf. 372712

RENAULT 19
árg. 11/94, til sølu, bilurin er nýlakkeraður og sýnaður. Hann er í sera góðum standi.
Tlf. 321832
arb. 314360 lok. 25/29

TIL MAZDA 323
ynskist ein motorbjálki/brúgv aftan.
Tlf. 218664

TIL SØLU
Nissan Bluebird 2,0, aut. gear, GLX, árg.´87, sær gott út.
Tlf. 221021

TOPPSTYKKI
Eigur tú eitt toppstykki til Mazda 626, árg. ´87, 1600 motor at selja mær? So ring
tlf. 423073 ella 220653

TOYOTA AVENSIS 1,8
liftback, Terra, árg. 99, koyrt 8500 km, svartur. Til sølu fyri 145.000 kr.
Tlf. 456900

TOYOTA CARINA II
liftback, árg. ´84, til sølu sum eykalutir. Prísuppskot 2.000 kr.
Tlf. 220243

TOYOTA CELICA
árg.´87. Til sølu. Við 16" sportfelgum + píkadekk á 15" felgum. Bilurin er í besta standi! Nærri fæst at vita á
tlf. 214112

TOYOTA COROLLA
EE 90 Sedan, árg.´87, automatgear. Bilurin er í góðum standi, nýlakkeraður og sýnaður í jan. 2000.
Tlf. 456277 ella 289277

TOYOTA COROLLA
AE80 til sølu, bilurin er í góðum standi, sýnaður í 99.
Tlf. 321832 arb. 314360
lok. 25/29

TOYOTA COROLLA 1,3
St. car, árg.´86. Tvey sett dekk á felgum, píkadekkini eru nýggj. Til sølu fyri 7.000 kr.
Tlf. 211089 ella 421089

TOYOTA LANDCRUSER
Sær gott út, til sølu fyri hægstbjóðandi.
Tlf. 422045

VETRARDEKK TIL SØLU
Nýggj lamell/píkadekk, flest allar støddir, til sølu.
Tlf. 282691/317691

VISKARAMOTOR
Hava tygum ein brúktan viskaramotor við armi og haldara til Opel Kadett 1,3 árg. 1987. At selja mær. Ring
314780 ella 284785

VW VIENTO 1,9 TD
árg. aug. ´96, vínreyður hevur fartpilot og alufelgur. Sera vælhildin, selist um hóskandi boð fæst.
Tlf. 317570 ella 283757

Amboð

LASTBILALYFT
í góðum standi til sølu, lyftur max. 26 tons.
Tlf. 311631

SNIKKARABONKUR
brúktur, 2,25 cm. Til sølu.
Tlf. 361133

Arbeiði

ÁLÍTANI KVINNA
søkist til lættari húsarbeiði 1-2 ferðir um vikuna.
Tlf. 216262

ARBEIÐI YNSKIST
18 ára gamal drongur søkir alt fyrifallandi arbeiði, havi lastbilkoyrikort og dugi at koyra gravimaskinur.
Tlf. 422394 ella 284792

FA. HÚSAUMVÆLING: TIMBURA
Alt timburarbeiði verður gjørt.
Tlf. 215214

MÚRARAARBEIÐI
Alt múraraarbeiði verður gjørt. Obindandi tilboð verða givin.
Múraravirkið Líðin
Tlf. 220583 ella 424073

REINGERÐ
Um nakar hevur brúk fyri hjálp í húsinum.
Ringið tlf. 310171

SP/F T.M.S.V
Alt timbur og snikkara arbeiði verður gjørt skjótt og væl.
Tlf. 371755, 371761 og 283275

VILLA SERVICE
Isolering af lofter, etageadskillelse, vand og varmerør udføres.
Tlf. 316235 efter kl. 18.
Dansk tale

Barnaútgerð

10 MÐR. GAMAL
bláur Brio barnavognur við babylift, puslitasku, regnslag, flugunet og hjulyvirtræk. Til sølu fyri 3000 kr.
Tlf. 444932

BARNAVOGNUR
Gráur leður Brio barnavognur, sera væl viðfarin, sær út sum nýggjur. Nýprísur 5.500 kr. Til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 371177

BRIO COMBIVOGNUR
til sølu fyri 2.500 kr. Hann er myrkabláur við barnamotivum. Bert brúktur til eitt barn.
Tlf. 317383

BRIO KOYRISTÓLUR
hvítur, lítið brúktur til sølu fyri 1.300 kr. Nýprísur kr. 2.800 kr.
Tlf. 321716

TVÍBURÐAVOGNUR
av merkinum Brio, kann kombinerast til sølu.
Tlf. 318476
eftir kl. 17

EIN GRØN
silvurcross babylift til sølu fyri 400/500 kr. Ein babysittari við bamsumotivi til sølu fyri 100 kr. Bert brúkt til eitt barn.
Tlf. 320894

SIMO BARNAVOGNUR
Ein ljósagráur SIMO barnavognur, eitt Brio pusliborð og ein ljósagráur Brio koyristólur, við koyriposa úr føroyskum skinn, er bíliga til sølu.
Tlf. 448728

SIMO KOMBIVOGNUR
til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 315698

Barnaansing

AUPAIR
genta til Íslands. Ungt par í nýggjum húsum í Reykjavík við øllum hentleikum søkir gentu við koyrikorti at taka hond í húsarbeiði og koyra børn í skúla.
(16, 11, 9 og 3 ár) Konan er heimaarbeiðandi.
Tlf. 00354 4833988
Fax. 00354 4833534

BARNAANSING
Er tað nøkur fitt og barnavinarlig genta ella reserva omma í vesturbýnum, ið hevði tíma at ansa upp á meg, meðan mamma mín syngur hóskvøld og onkuntið í vikuskiftinum. Eg eiti Hjalti og eri 5 ár. Tú kanst ringja til okkum á
tlf. 311033

GENTA/KVINNA
Søkt verður eftir gentu/kvinnu at ansa 3 ára gomlum dreingi, mánadag – friggjadag millum 8 - 16. Vinarliga ring
tlf. 311688

ÁLESUND
Genta sum er góð við børn, søkist til Álesund at passa 4 ára gomlu Natalie. Bilettin er goldin aftur/fram, kost, logi + løn.
Vinarliga ring 0047 70125290 ella 371011 Aimi

Bátaútgerð

12 TONS BÁTUR
v/ Volvo Penta motori MN 100 B til sølu. Báturin stendur uppi á landi til umvælingar.
Tlf. 282998

BRÚKTAR
Automatiskar snellur. Vit hava nakrar biligar brúktar snellur á goymslu. Snellurnar verða seldar við garanti. Áhuga ringi
tlf. 212422

EIN STARLET 29
til sølu fyri hægstbjóðandi. Ring á
tlf. 327077
eftir kl. 17

FÝRA
stk. elektriskar snellir av slagnum BJ 500 til sølu.
Tlf. 375202

ÚTRÓÐRARBÁTUR
merktur 19,9 t, uttan fiskiloyvi. Báturin er í góðum standi og væl útgjørdur. Áhuga ringi
tlf. 212422

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*
undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út- & sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ ……

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi

Sent hevur:

Navn: ……

Bústaður: ……

Bygd/býur: ……

Tlf.: ……

»Lýsingartorgið«
Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76,
110 Tórshavn

Til frímerki

GER KVETTIÐ!!
Góður 25 ára gamal føroyskur bátur (stórt seksmannafar) við 3 ára gomlum Yanmar 10 HK motori (hevur verið í gongd í uml. 15 tímar). Til sølu fyri 18.000 kr. Dette superkup kan gennemtriumfes på
tlf. 220424
efter kl. 18

GLASTREVJABÁTUR
til sølu. Um hóskandi boð fæst, er ein skjóttgangandi glastrevjabátur 28 fót til sølu. Báturin hevur alla nautiska útgerð, eisini hevur hann snellur, línuspæl og lína fylgir við. Báturin, sum hevur spildurnýggjan motor, er klárur til fiskiskap, hann er í besta standi.
Tlf. 333163

PÁHANGSMOTORUR
Johnson 5 HK, høvuðsumvældur, til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 315062

Bingo

BINGO
Gott bingo verður í TB-húsinum leygardagin 19. feb. kl. 17.00. Høvuðsvinningur á lutaseðli 2x500 kr. Annaðhvørt bingo 300 kr. og annaðhvørt 1/2 krov.
Tvøroyrar Bóltfelag

EYDNUHJÓL
Árliga eydnuhjólið hjá B71 verður í døgunum 13. og 14. mai. Vit taka fegin ímóti lutum.
Nevndin

FRÁ ST.Í.F
Eydnuhjól og vørutombola verður á Strondum leygardagin 26/2 2000. Tíð og stað verður lýst seinni.
ST.Í.F

GOTT BINGO
verður í Havnar klubba mánakvøldið 21. feb. kl. 19.00. 15 plátir 100 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli vikuskiftisferð til Ísland, 3 nætur á Hotel Reykjavík v/morgunmat. Koyring heim.
Astma/Allergifelagið

GOTT FØSTULÁVINTS BINGO
verður leygarkvøldið 19/2 kl. 19. 15 vinningar á lutaseðli m.a. 2 gávukort á 1.000 kr.
Kaggin

STUÐLAFELAGIÐ Í.S.B
hevur gott bingo í Havnar Klubba týskvøldið 15/2 kl. 19. 15 plátir 100 kr. Burturlutað verða 3 gávukort á 1.000 kr. 75. kr. ímillum spølini + eykaspæl.
Koyring heim.
Nevndin

SUÐUROYINGAR
Gott bingo verður í skúlahøllini í Trongisvági mánakvøldið 21. febr. kl. 19.00. Annaðhvørt bingo gávukort á kr. 300,00 og annað hvørt gávukort á krov. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávukort á kr. 1.000,00 kr. 12 plátir kr. 100,00
Tvøroyrar
Svimjifelag

Burturm. / funnið

SKINNVØTTIR
Svartir, hondseymaðir skinnvøttir, burturmistir um miðjan januar í miðbýnum í Havn, møguliga á Kongabrúnni-Tryggingin/Niels Arge. Hevur tú funnið teir, vinarliga ring á
tlf. 311111
lokal 122

HÚS TIL SØLU

Mál nr. 157
Adr.: Ennivegur 31, Fuglafjørður
Stødd á húsum: 64 m² x 2 (hjall og úthús)
Byggiár: 1947
Kostnaður: 480.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 160
Adr.: Marknagilsvegur 54, Tórshavn
Stødd á húsum: 184 m² í tveimum hæddum
Stødd á grundøki: 550 m²
Byggiár: 1970
Kostnaður: 1.300.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 164
Adr.: Skrivaragøta 3, Tórshavn
Stødd á húsum: 425 m²
Stødd á grundøki: 450 m²
Byggiár: 1974
Kostnaður: 1.800.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 167
Adr.: Millum Gilja 64, Hoyvík
Stødd á húsum: 142 m²
Stødd á grundøki: 506 m²
Byggiár: 1987/88
Kostnaður: 1.400.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 168
Adr.: Vágur
Stødd á húsum: 80 m² x 2 + lítlan hjall
Stødd á grundøki: 600 m²
Byggiár: Uml. 1973
Kostnaður: 295.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 170
Adr.: Norðari Ringvegur 11, Tórshavn
Stødd á húsum: 110 m² x 2 + loft og hjall
Stødd á grundøki: 600 m²
Byggiár: 1979
Kostnaður: 1.150.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 171
Adr.: Vágur
Stødd á húsum: 71,4 m²
Stødd á grundøki: 300 m²
Byggiár: 1955/56
Kostnaður: 300.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 172
Adr.: Langasandur
Stødd á húsum: Uml. 240 m²
Stødd á grundøki: 1000 m² + 1 trød 16000 m²
Byggiár: 1955
Kostnaður: 1.000.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 173
Adr.: Onnugøta 10 a, Hoyvík
Stødd á húsum: Uml. 100 m² + eitt lítið úthús
Stødd á grundøki: 200 m²
Byggiár: 1989
Kostnaður: 950.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 174
Adr.: Hoyvíksvegur 20, Tórshavn
Stødd á húsum: Uml. 50 m² x 2 + lágan kjallara
Stødd á grundøki: 133 m²
Byggiár: Eldri hús
Kostnaður: 800.000,- ella hægsta boð yvir

Ætla tygum at selja ella keypa hús, vilja vit fegin hjálpa tygum

GRUNDØKI og JØRÐ:

Mál nr. 609
Adr.: 440 Haldarsvík
Vídd á jørðini: 2 gyllin + innangarðs
Kostnaður: Kr. 60.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 531
Adr.: 430 Hvalvík
Vídd á grundøkinum: 763 m² (við ástandandi smáttu)
Kostnaður: Kr. 70.000,- ella hægsta boð yvir

Mál nr. 532
Adr.: 825 Froðba
Stødd á jarðarstykkjum: 590 m² (við ástandandi sethúsum og úthúsi)
Undir Skorunum, 771 m²
Í Mýrubyrgi, 4706 m²
Í Skálvíksjørð, 696 m²
Uttangarðsjørð í Botnskarðshaga 1 gl.
Kostnaður: Samlað boð ynskist uppá alla ognina

Húsamekling
Sp/f Protek, Vaglið, Postsmoga 331, 110 Tórshavn,
Tlf. 319321, Fax 319331, E-mail: protek@post.olivant.fo
Avgreiðsla kl. 9-12 og 13-16.
Keyp og søla av fastari ogn

UR BURTURMIST
27. januar er eitt gullitt damuur, leinkjan gull-silvurlitt, burturmist á strekkinum Bókbindaragøta, Varðagøta ella uttanfyri handilin Sóljan í Havn. Møguligur finnari biðist ringja
tlf. 455282

Býli

BÝTA UM HÚS
í summar?? Føroysk/donsk familja búgvandi í Egtved, ynskir at býta um hús í uml. 3 mór. frá uml. 1. maj - helst í Klaksvík. Okkara hús eru 154 m2. Umleið 18 km frá Billund og Vejle. Áhugaði kunnu ringja til Maritu Dalsenni Rask
Tlf. 0045 75551329 ella 456430
e-mail: brask@email.dk

GARAGA/ GOYMSLUHØLI
við lítlum kontóri, ynskist til leigu í Tórshavn-umráðnum.
Tlf. 317865
ella 282165

GRUNDSTYKKI
607 m2, matr. nr. 276 R Glyvra bygd. Til sølu fyri 115.000 kr.
Tlf. 448935

HÚS ELLA ÍBÚÐ
við minst tveimum kømurum ynskist til leigu skjótast gjørligt.
Tlf. 313277, Eyðna

HÚS Í VÁGI
húsini eru frá 1959 og eru 77 kvm. í 2 hæddum + garaga. Húsið fekk nýtt tak í summar. Liggja væl fyri og hava gott útsýni. Prísur: 400.000,- ella hægsta boð.
Tlf. 374433

HÚS SØKIST
til leigu í Klaksvík, skjótast gjørligt. Vinarliga ringi
tlf. 457096

ÍBÚÐ ELLA HÚS
ynskist bíliga til leigu í Eysturoynni, frá uml. 1/2 maj.
Tlf. 281367 ella 0047 51750038

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
ynskist. Er tað nakar, sum kann leiga mær eina íbúð í Keypmannahavn skjótast gjørligt? Eg havi fast arbeiði og fari væl um.
Tlf. 0045 45254905 (arbeiði)
0045 32886478 (e. kl. 17)
e-mail: dn@dfu.min.dk

ÍBÚÐ SØKIST
Einlig 32 ára gomul, leitar eftir onkrum at búgva í.
Tlf. 316226

ÍBÚÐ TIL LEIGU
2 ver. íbúð í Keypmannahavn til leigu.
Tlf. 0045 38711444 ella 314928

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Havn, til trúgvandi fólk. Má hava 2-3 kømur.
Tlf. 283812

ÍBÚÐ YNSKIST
Tvey søkja íbúð í Havn, bæði hava fast arbeiði.
Tlf. 211966

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungur friðarligur drongur ynskir íbúð í Havn til leigu sum skjótast.
Tlf. 214474
ella 447638

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru eitt friðarligt ungt par, ið ynskja íbúð/hús á Strondum ella Skála, bíliga til leigu.
Ring 448075, Bjarni og Mari

ÍBÚÐ YNSKIST
Í Havn, Argjum ella Hoyvík, frá uml. 1. mars.
Tlf. 320366 ella 214220

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Havn ella Kollafirði.
Tlf. 317139

TOFTABÚÐIN
í Vági til leigu.
Tlf. 317456
ella 371291

LEIGA SUMMARHÚS
30 min frá Árhus, 15 min frá Árhus lufthavn, við góða strond, til leigu. Sí www.sologstrand.dk - hús nr. 53-3535. Ella ring
tlf. 366118

UM
hóskandi boð fæst, eru hús okkara á Torvgøtu 26 til sølu.
Tlf. 457513 ella 214513

UMBÝTING!
Nýggjari hús í millum Gilja, í sera góðum barnavinarligum umhvørvi, leiga: 4.800,-. Eg ynski eina íbúð nærhendis býnum. Hevur hetta tín áhuga, vinarliga ring til mín á
tlf. 318562 ella 314356

VEGNA PLÁSSTROT
søkja vit eftir størri íbúð, skal hava tvey kømur. Vinarliga ringið 320561

Dansur

GÓÐUR DANSUR
við James Olsen Band, verður í VB-húsinum, leygarkvøldið 19/2.
VB

Dýr

2 FITTIR HUNDAHVØLPAR
verða latnir djóravini.
Tlf. 370541

DVØRGHAMSTRARAR
til sølu fyri 20 kr. stk.
Tlf. 319587

HESTUR
10 ára gomul føroysk ryssa, bíliga til sølu. Møguliga kann saðil keypast við. Bert til djóravin.
Tlf. 448769

HUNDAHVØLPAR
5 vikur, undan lítlari tík, fáast við at avheinta teir. Bert til djóravin.
Tlf. 319069

HUNDAHVØLPUR
sera fittur hundahvølpur, ca. 5 mór., er labrador. Sóknast eftir góðum heimi, er væl vandur.
Tlf. 317298 ella 282098

Fundir

AÐALFUNDUR
verður sunnudagin 21.05. kl. 15.00 í húsum felagsins, Bryggjubakki 10.
Reyði Krossur Føroya

AÐALFUNDUR
verður í KFUK í Havn sunnudagin 27. feb. kl. 15, dagskrá sambært lógini.
KFUK

AÐALFUNDUR
lýst verður til aðalfund hjá T.B. mikudagin 23. februar kl. 20. Skrá sambært lógum felagsins.
Tvøroyrar bóltfelag

AÐALFUNDUR
Felagið Morbus Bechterew hevur aðalfund í MBF húsinum leygardagin 26.2. kl. 14.00. Skrá sambært
lógum felagsins.

ALMENNUR FUNDUR
Týskvøldið 15. feb. kl. 20 verður almennur fundur í gamla prestagarði á Nesi. Ingellise Sørensen heldur fyrilestur. Evni: liva heilsugott og hugsa positivt, øll eru hjartaliga vælkomin.
Tofta Kvinnufelag

ÁRLIGI
altjóða kvinnubønardagurin verður í KFUK í Havn friggjadagin 3. mars kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

ÁRSAÐALFUNDUR
verður í Vesturhøllini í Fámjin 19. feb. kl. 17. Skrá: formansfrágreiðing, framløga av roknskapi, val av formanni og nevnd, umboði til flokstingið, aðalstjórnarumboði og ymiskt.
Suðuroyar Tjóðveldisfelag

ÁRSAÐALFUNDUR
Fundurin verður í Roynhøllini leygardagin 26. februar kl. 16.00. Skrá sambært lóg felagsins.
Royn

ÁRSAÐALFUNDUR
Ársaðalfundurin verður leygardagin 26. februar kl. 17 í Roynhøllini. Skrá sambært lóg felagsins.
Bóltfelagi Royn í Hvalba

ÁRSVEITSLA
Eftir aðalfundin verður veitsla í Vesturhøll 19. feb. kl. 19. Orkestur spælir, tilmelding á tlf. 373823, 214823, 371218 og 211218
Suðuroyar Tjóðveldisfelag

SEYÐAHUNDAFELAG FØROYA
Aðalfundur felagsins verður á Búnaðardeplinum í Kollafirði 20. feb. kl. 14.00. Skrá samb. lógum felagsins.
Nevndin

Húsarhaldstól

KØLISKÁP
nýggjan orkumotor, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 315062

TURKITRUMLA
Uml. 9 ára gomul, av merkinum Philips til sølu.
Tel. 284894

VASKIMASKINA
Uml. 10 ára gomul, av merkinum Zanussi til sølu.
Tlf. 284894

Innbúgv

2 TÍÐARLEYSAR SOFUR
Tvær tíðarleysar 3 pers. sofur bíliga til sølu !! Ger kvettið og nýt møguleikan at keypa 2 jørðlittar sofur sum eru úr brúnum stoffi. Tær hava tíðarleyst, klassiskt snið og eru bert 2 ára gamlar. Møguleiki er at síggja sofunar, sum eru av sama slag sum Verona hjá Idé Møblum. Skullu síggjast.
Áhugað ringið ímillum 8-15:30 yrkadagar á:
321032 Karin
315160 - 183 Tina

2 TÍÐARLEYSAR SOFUR
Tvær tíðarleysar 3 pers. sofur bíliga til sølu !! Ger kvettið og nýt møguleikan at keypa 2 jørðlittar sofur sum eru úr brúnum stoffi. Tær hava tíðarleyst, klassiskt snið og eru bert 2 ára gamlar. Møguleiki er at síggja sofunar, sum eru av sama slag sum Verona hjá Idé Møblum. Skulu síggjast.
Áhugað ringið ímillum 8-15:30 yrkadagar á:
321032 Karin
315160 - 183 Tina

3 MANS SOFA
+ lenistólur, úr grønum stoffi, bert 1 ára gamalt til sølu.
Tlf. 448764

3 LENISTÓLAR
3 brúktir lenistólar og eitt sofaborð selist fyri 500 kr.
Tlf. 315274

BARNAMØBLAR TIL SØLU
Briks v/ madrass og hyndum, skrivaraborð og skáp. Sær út sum nýtt, til sølu fyri 1.400 kr.
Tlf. 371454
ella 372454